Springaradrápið í Kollafirði:

Hesuferð sleppa teir helst ikki snikkaleysir

- fútin umhugsar nú, at reisa ákæru móti grindamonnunum í Kollafirði, sum 9. august 1990 róku springarabólk inn á Kollafjørð, ið ongantíð hevur verið góðkend hvalvág

Tá menn fóru í grind 27. september 1989, har ein grind legði beinini í Haraldsundi, vóru átta mans ákærdir fyri ólógliga at hava dripið grind.

Dómur er nú fallin í málinum, og grindamennirnir vóru fríkendir.

Eftir havt skilst, so hava lógarbrótarnir í Haraldsundi verið heppnir, uttan tó at teir vistu av tí.

Orsøkin til at teir vóru fríkendir er helst tann, at eingin góðkenning av hvalvágum var í gildi, tá grindin doyði í Haraldsundi.

Higartil hevur ein fyribils góðkenning av hvalvágum verið galdandi fyri ávíst tíðarskeið í senn. Slík kunngerð hevur so verið lýst av nýggjum, so hvørt sum fráleið.

Tá grindin í Haraldsundi legði beinini 27 september 1989, var als eingin reglugerð. Tann seinasta reglugerðin um góðkendar hvalvágir var lýst at galda frá 1. september - 22. november 1989.

Hóast hetta kanska er ein heldur løgfrøðilig snilda, so gekk tað hvørki verri ella betur enn, at grindamenninir sluppu snikkaleysir.

21. november 1989 setir Føroya Landsstýri í gildi Kunngerð um góðkenning av hvalvágum.

Grindamenn gevast ikki í hálvum gekki, tá møguleiki er fyri einum kóki í døgurðapottin.


9. august 1990 sóu menn ein springarabólk í Kollafirði, og teir smæddust ikki burtur. Hóast eingin grindaformaður og sýslumaður var á staðnum og trupult var at fáa raksturin at ganga, so tóku teir málið í egnar hendur og springarnir løgdu beini í Kollafirði, hóast hetta ongantíð hevur verið góðkend hvalvág.

Sýslumaður og løgregla komu á staðið, tá drápið var av, og har vóru eini 20 - 30 mans avhoyrdir.

Frá varafútanum frættist, at ákæra móti grindamonnunum hevur bíðað til dómurin fall í Haraldsunds- málinum.

Um stutta tíð verður støða tikin til, um ákæra skal reisast móti grindamonnunum í Kollafirði, sum var fullkomiliga óreglulig í allar mátar.

Dagny



Tá grindin í Haraldsundi legði beinini, var als eingin reglugerð til. Grindamennirnir, sum vóru við í drápinum, tá springarar vóru riknir inn á Kollafjørð og dripnir, kunnu vænta at verða ákærdir fyri brot á grindalógina. Hóast reglur vóru galdandi, so vóru tær als ikki fyldar.

Sosialistiskt Ungmannafelag í Føroyum

Felagsstjórnar- og eykaaðalfundur

Lýsti felagsstjórnar- og eykaaðalfundurin, sum skuldi verða í dag, leygardagin, er útsettur til í morgin, sunnudagin, 13 januar kl 15.00.
Fundirnir verða í felagshølunum á Argjum.
Skrá sambært lógum felagsins.
Allir limir kunnu møta.

Nevndin

sosialurin

— altíð fyrstur við tí síðsta!

Gerist haldarar **NÚ**
— og fáið alt hetta:



Einsamøll
— eingi tíðindi

— 5 bløð um vikuna í 3 mánaðir fyri **bert 195,-**

Haldið so:
tíðindablaðið **sosialin**
og fáið henda góða vinin — Føroya mest lisna og mest endurgivna blað
5 ferðir um vikuna
fyri bert **½ sølupris!**

Haldið blaðið
* við teimum fjølbroyttu tíðindunum
* við besta trúvirðinum
* sum birtir upp undir skilagott og mennandi tak
* sum er blað fólksins

tíðindablaðið sosialurin *sjálvandi*

- sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin

Ja! Eg gerist haldari av Tíðindablaðnum Sosialinum og fái blaðið **5 ferðir um vikuna.**
Haldaragjaldið er kr. **195,-** fyri ársfj.
Haldarar uttanlands gjalda kr. **230,-**/ársfj.
Goldið verður ongantíð fyri fleiri bløð enn tey, ið eru eftir at koma í einum ársfjórðingi.

Navn: ____________

Bústaður: ____________

Bygd/býur: ____________

Kannað postverkinum

Ókeypis Sosialurin rindar postgjaldið
64

tíðindablaðið sosialurin
Box 76
110 Tórshavn